


www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 06 - 2012

# Kinesiskur boripallar komin til Føroya

Seint í gjárkvøldið kom kinesiski boripallurin Cosl Pioneer á leiðina á føroyska landgrunninum, har hann skal liggja komandi fýra til fimm mánaðirnar. (61°15'42.75''N - 004°59'48.93'' W.) Á Brugdu 2 leitimiðinum er eisini Esvagt Connector hjá felagnum Esvagt Thor. Hann hevur fingið uppgávuna at vera standby skip alla boritíðina. Í dag fer tyrlan hjá Atlantic Airways fyrsta túrin til boripallin, sum eitt nú sæst á kortinum á heimasíðuni www.marinetraffic.com. Eisini á útgerðarstøðini í Runavík gera tey nú klárt til at veita sínar mongu tænastur til Brugduboringina. Ì morgin kemur eitt av teimum mest framkomnu útgerðarskipunum í norska frálandaflotanum, KL Brofiord á Runavík. Vinnumálaráðið visti í skrivi fríggjadagin at siga, at borururin verður settur í undirgrundina í dag. Myndir Vit síggja á kortinum, hvar Cosl Pioneer og Esvagt Connector koma at liggja komandi mánaðirnar KL Brofiord, sum fer at sigla millum Runavík og pallin. Kl Brofiord her frammanfyri systurpallin hjá Pioneer, Cosl Innovater í norskari havn.